# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## 1 + 1 = 1 kommuna

Leygardagin fara teir 1380 íbúgvararnir í Gøtu og Leirvíkar kommunum til atkvøðugreiðslu um eitt mál, sum fær stóra ávirkan á hetta økið í framtíðini. Spurningurin er rættiliga einfaldur: Um tey eru fyri ella ímóti at kommunurnar báðar verða lagdar saman. Borgarin fær fyrst høvið at siga sína hugsan, áðrenn bygdaráðini í báðum støðum taka endaligu avgerðina út frá teirri vegleiðandi fólkaatkvøðuni.

Hóast spurningurin er einfaldur, so krevur hann kortini eitt greitt og væl umhugsað svar. Óhugsandi er ikki, at hetta bert er byrjanin til ein útvikling í øðrum støðum kring landið hesa komandi tíðina.

Í blaðnum í gjár varð nógv gjørt burtur úr hesum málinum. Har varð tosað við fólk sum bæði vóru fyri og ímóti hesi ætlanini. Og sum skilst á lagnum verður uttan iva greiður meiriluti fyri eini samanlegging. Hesi seinnu árini hava vit sæð hesa somu gongdina, at kommunur leggja saman sjálvbodnar. Um tær ræðast fyri at verða tvingaðar saman við øðrum kommunum, skal verða ósagt. Men besta loysnin man kortini verða hon, sum ein higartil hevur sæð: Nevniliga at tað eru tey einstøku bygdaráðini sum sjálvi gera av, hvønn tey vilja leggja saman við.

Í Miðjýllandi verður ofta tosað um tann virkisfúsa og ídnaðarkenda tríhyrningin. Her fáa túsundtals fólk sína dagligu inntøku. Hetta økið breyðføðir snøgt sagt einum stórum parti av hesi donsku hálvoynni. Venda vit eyguni hendavegin so er tað júst tað sama ein sær í hesum økinum, sum nú fer undir kommunalt samstarv. Bæði Gøta og Leirvík eru vinnulívsbygdir burturav. Tær hava nógv samstarv sum er, og tí skilir ein væl sjónarmiðini fyri at hetta samstarvið verður víðkað til eisini at umfata tær kommunalu tænasturnar.

Spurningurin er so, hvat fer at henda í framtíðini. Hugsandi er, at hetta samstarvið millum Gøtu og Leirvík bert er byrjanin til ótradisjonelt samstarv tvørtur um enn eitt kommunumark - til Fuglafjarðar, og kanska eisini umvegis ein undirsjóvartunnil - til Klaksvíkar. Ella heilt aðrar vegir!

Hetta kann gerast eitt spennandi íkast til menningina av føroyska samfelagnum innan útbúgving, fiskivinnu og vinnu á landi, bara fyri at nevna nakað. Her kundi grundarlag verðið skapt fyri einum tríhyrntum ella ferhyrntum samstarvi. Úrslitið av hesum kundi gjørt hetta økið til ein sannan vinnumiðdepil í Føroyum.

Framtíðin fer at vísa, hvussu samstarvshugurin verður. Grundarlagið og fortreytirnar eru í øllum førum til staðar. So má agg, fordómar og misálit jarðast, og tað ongatíð ov skjótt!

**Sosialurin**



P/F Esmar Simonsen:

## Fimm bilmerkir á Kambsdali

TÍÐINDASKRIV

Í sambandi við at P/F Esmar Simonsen nú umboða øll bilmerkini hjá Sp/f Norðbil og Sp/f Nordcar, Honda, Hyundai, Skoda, Fiat og BMW, verður opið hús á Kambsdali leygardagin 9. september frá kl. 10-17.

Umframt nýggjar bilar verða eisini nógv sera góð brúktbilatilboð.

Øll sum keypa bil frá Sp/f Norðbil og Sp/f Nordcar í september og oktober eru við í lutakastinum um 10 flogseðlar frá Altantic Airways.

## Teitur beinleiðis í týskum og donskum útvarpi

**Mikudagin 20. september spælir Teitur á stóra týska tónleikaídnaðarfestivalinum, bæði dansk P3 og týska Radio Fritz fara at senda frá konsertini, ið er 3 dagar eftir at Stay Under The Stars verður givin út í Týsklandi**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Í løtuni er Teitur á konsertferð í USA, men um tvær vikur kemur Teitur til Evropa ein túr, at spæla eina konsert. Stay Under The Stars kemur út í Týsklandi 17. september, og 20. september spælir Teitur á risastóru Popkomm messuni í Berlin.

Núerskráin fyri Popkomm almenn. Har sæst, at Teitur er fyrsta navnið, ið skal á pallin hetta kvøldið, ið hevur fingið yvirskriftina Denmark@Popkomm 2006. Konsertin verður í stóra klubbanum Fritzklub im Postbahnhof, ið er gamla postbreytarstøðin í Eystur Berlin, umframt Teitur spæla Outlandish, Powersolo, Junior Senior, Spleen United og Infernal hetta kvøldið.

Føroyavinurin Arne List, ið býr í Týsklandi sigur, at hetta stað er ein tann størsti av hesum slagnum av tónleikaklubbum í Berlin, hølini taka eini 1200 fólk, og at í fjør var útselt í sambandi við Popkomm. Tað er útvarpsstøðin Radio Fritz, ið eigur klubban. Hetta er ein útvarpsstøð, ið sendur sendingar til tey ungu í Berlin og Brandenburg. Henda útvarpsstøð fer væntandi at senda konsertina beinleiðis, ella í øllum førum partar av henni. Danska útvarpsstøðin P3 sendur konsertina beinleiðis, so Teitur spælir hetta kvøldið beinleiðis fyri einum sera stórum lurtaraskara í Danmark og Týsklandi.

Radio Fritz fer at ummæla konsertina hjá Teiti, og eisini nýggju fløguna hjá honum, greiðir Arne List frá.

Almenna Danmark brúkar nógvan pening og orku uppá at luttaka á hesi messu. Hetta verður gjørt fyri at menna tónleik, sum útflutningsvinnu. Í fjør spældu m.o. Nephew, Carpark North og Kashmir á messuni. Í tónleikaídnaðinum verður Popkomm mett at vera ein festivalur, ið snýr seg um bólkar, ið gerast stórir um nøkur ár. Tey frá ídnaðinum, ið luttaka á festivalinum eru tey, ið veruliga hava áhuga í at vitja festivalin. Her er ikki so nógv talan um glitur og annað tílíkt hóvasták, men heldur um veruligan handilsskap innan tónleikaídnaðin. Her verða nøvnini funnin, ið ídnaðurin fer undir at satsa uppá komandi árini.

Sí samlaðu Popkomm skránna á popkomm.de ella vitja Fritz Club á fritzclub.com


**Sosialurin** Sosialurin Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14:00

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.